# Skála Ítróttarfelag hevur 40 ár á baki

**Dagurin var 15. mai 1965. Tá savnaðust skálafólk í Losjuni við tí endamáli at seta á stovn eitt ítróttarfelag í bygdini. Ungdómurin á Skála hevði tá í nøkur ár róð kapp, og vildi nú eisini spæla bólt, men fyri at sleppa upp í Eysturoyarkappingina varð neyðugt at skipa seg í felag**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sigast má, at nógv vatn er runnið í ánna, síðan Skála Ítróttarfelag varð stovnað fyri 40 árum síðan.

- Kappingarárið 2001 vann besta liðið hjá felagnum sær rætt til at spæla í bestu deildini í fótbólti, og hóast tað mangan breyt í bæði borð, eydnaðist felagnum at vera hangandi í deildini.

## Heiðursmerki

Í tíðindaskrivi fegnast felagið um, at tað í fjør fyri fyrstu ferð eydnaðist at vinna heiðursmerki í bestu deildini, tá ið liðið endaði á triðja plássi í landskappingini.

- Hetta hevði við sær, at tá ið Skála Ítróttarfelag fyrr í ár fylti 40, skuldi felagið samstundis á fyrsta sinni luttaka í evropeiskum fótbólti. Hesir dystir vórðu leiktir í síðsta mánaði, og hóast okkara leikarar samanlagt taptu báðar dystirnar 3-0, halda vit, at teir komu stak væl frá uppgávuni.




## Góðar umstøður

Skála Ítróttarfelag heldur, at ein orsøk til stóru framgongdina seinnu árini er, at felagið hevur serstakliga góðar umstøður at arbeiða undir.

- Vøllurin, sum varð bygdur í 1977, er dagførdur fleiri ferðir, soleiðis at hann í dag er fult á hædd við øll krøv, bæði hvat leikligum umstøðum viðvíkur við nýggjum graslíki, ljósum og øðrum – og hvat áskoðaraumstøðum viðvíkur við nýggja áskoðaraskýlinum, sigur felagið.

## Gongur væl

- Leikliga hevur gingið rættiliga væl í hond hjá felagnum í ár. Liðið í Formula-deildini kappast aftur í ár um oddasessirnar, og yngru deildirnar hjá felagnum klára seg eisini væl. Soleiðis megnaðu smágenturnar at vinna Niels L. Arge-steypið, tá tær í finaluni vunnu 3-1 á VB.

Skála Ítróttarfelag ásannar, at kvinnurnar hjá felagnum sum heild hava klárað seg rættiliga væl.

- Tær vaksnu vunnu FM tvær ferðir og steypakappingina einaferð. Í 1992 vunnu tær báðar kappingarnar, so greipan í bestu kvinnudeildini hevur eisini verið ein túr inni á Skála, sum felagið tekur til, nú Fjarðarstevna verður um vikuskiftið og felagið er farið um tey fýrati.




*Skála Ítróttarfelag heldur, at ein orsøk til stóru framgongdina seinnu árini er, at felagið hevur serstakliga góðar umstøður at arbeiða undir*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vælkomin á Fjarðastevnu 2005





Runavíkar Kommuna

www.runavik.fo

Sosialurin 341800